# Dokumentatión: *Fólkatalslistar 1830*

Dokument-referenca:
Guttesen, R. (Ed.) (2010): *Færø Amts Folketalsliste 1830.* Føroya Landsskjalasavn. Amtsarkivið 1831. Indkomne Breve (F.A.J.for 1831 B7 No. 1, v.fl.) Internet, dd.mm.aa. <History.fo>

Dokumentsøga:

- **Specifikatión av dokumentum**

Listarnir eru innsendir til Amtið av sýslumonnunum í januar, februar og marts í 1831. Teir eru uppsettir eftir nakað sama leisti. Bygdin, Húsið og har er skilt millum kvinnur og menn, yvir og undir 15 ár (konfirnatiónsaldur). Fýra listar hava upplýsing um starv ella arbeiðsstøðu. Har aftrat hevur Vága-listin fleiri viðmerkingar um serlig viðurskifti í húsunum: sjúku, aldur, (manglandi) ogn ella fátækradømi.

- **Hvat er rætta árstalið?**

Listarnir eru innsendir fyrst í 1831, á nøkrum stendur fólkatal pr 30. december 1830, á øðrum pr 1. januar 1831. Eftir sum listarnir kunnu sigast at byggja á tær broytingar, sum eru farnar fram í 1830, følld, deyð og flutt, sum havi eg valt at halda meg til (árs-)talið 1830. Við øðrum orðum: ein ársuppgerð fyri 1830.

- **Søguligur kontekstur**

Løbner kommandantur, sum varð Føroya fyrsti Amtmaður í 1816, gjørdi tær vælkendu tabellirnar í 1814, har bæði fólkatal, ogn, og alt sum fólk livdu av, var talt upp. Hesar tabellir eru atgeingiligar á History. Haraftrat liggur ein pakki við tilsvarandi uppgerð av fólkatalinum (tó, uttan ogn og tílíkt) fyri árini 1821-24, og eitt leyst ark er funnið, sum hevur samanteljingar fyri land og sýslur fyri 1824-27. Ein úrdrátt av hesum havi eg gjørt niðast í hesi dokumentatión.

Haraftrat havi eg funnið fleiri ár aftaná ca. 1830 har samlaðir fólkatals listar, sum hesin frá 1830, liggja í Amtsarkivinum.

Eg hugsi, at tað kann hava verið so, at slíkir fólkatalslistar hava verið gjørdir á hvørjum ári, síðan Løbners tabellir vóru gjørdar. Hesar tabellir kunna hava verið eitt slag av ”base-line”. Tann miðfyrisitingin (centraladministratiónin), sum so líðandi bleiv bygd upp tá Løbner bleiv Amtmaður, man hava biðið sýslumennirnar senda hesar listar inn á hvørjum ári, men nakað ”ordra-bræv” er ikki funnið enn. Møguligt er, at listar finnast ella hava verið, sum eru uppaftur eldri. Tí neyðugt hevur verið at kenna fólkatalið ella talið á húsarhaldum, tá tíggjund og aðrir skattir skuldu krevjast, ella tá grind skuldi býtast. Eisini havi eg sæð dømir um fráboðanir frá fyrst í 1800-talinum um flytingar, følld og deyð, sum benda á, at tað hevur verið eitt slag av fólkaregistari til.

- **Ábyrgd fyri reinskriving vid meira**

Undirritaði Rolf Guttesen hevur reinskrivað (transskriberað) originaldokumentini, sum eg avfotograferaði á Landsskjalasavninum í juli 2010. Myndirnar hava nr DSC0081 til DSC00120 í mínum fotosavni. Hartil kom frá Skjalasavninum ein mynd eyka sendandi, IMG 2319, tí ein síðahjá mær av misgávum var lopin um.

- **Princippir fyri reinskriving**

Allir stavi- og skrivimátar eru sum í upprunaskjølunum. Har er vanligt, at øll persónsnøvn og staðanøvn eru skrivað við latínskum bókstavum, meðan aðrar viðmerkingar og textur er vid gotiskum.

- **Uppstilling**

**- Deild 1: Hús (nøvn), Bygdir, Sýsla (Excel-ark)**

Hvør sýsla liggur samlað. Hvør bygd hevur sítt rokniark. Samanteljing er gjørd við sigma-funktiónini á excel, og samanborin við tabell-summa um nøkur er. *Sigma* merkir telduteljing, *Summa* erupprunaliga samanteljingin við "hondkraft" í listunum

**- Deild 2: Bygdir, Sýslur, Landið ( Excel-ark)**

Hvør sýsla hevur sítt rokniark, har summa-tølini fyri hvørja bygd er førd yvir. Summa-tølini fyri sýslurnar koma so niðast. Seinasta rokniarkið her er, har tær seks sýslurnar veða taldar saman til tað samlaða fólkatalið í landinum.

**- Deild 3: Øll hús í hvørjari sýslu sær. Langir listar (Excel-ark)**

Her er fyri hvørja sýslu  sær øll nøvn (hús) úr øllum bygdum sett upp í ein samanhangandi, langan lista.

Sýslustyttingarnar (NO, OS, ST, VA, SA, SU) eru skrivaðar aftrat framman, ein stytting fyri hvørja bygd er sett inn (hygg hjálagda yvirlit). Hetta skuldi gjørd tað lættari hjá brúkarum at sortera eftir tørvi, td. eftir stødd á húski ella eftir nøvnum.

**- Deild 4: Fotografisk endurgeving av upprunaskjølum**

Her eru 4 dømir endurgivin:
Fyrsta og síðsta síða av listanum úr Eysturoyar Sýslu Sýslu. Hevur viðmerkingar um innsavnindarháttin.
Fyrsta og síðsta síða av listanum úr Vága Sýslu. Hevur serliga uppgerð av klassa og arbeiðsstøðu; haraftrat viðmerkingar um sjúku, fátækradømi og annað tílíkt í húsunum.

Rolf Guttesen,
13.11.2010

# Fólkatalið í landinum

| Ár | Fólkatal | vøkstur p.a. í % | Kelda |
|---|---|---|---|
| 1769 | 4773 | | Fólkateljing |
| 1801 | 5265 | 0,29 | Fólkateljing |
| 1813 | 5247 | -0,03 | Løbner'sa Tabellir; LSS |
| 1821 | 5486 | 0,54 | Amtsregistar, LSS |
| 1822 | 5890 | 6,86 | Amtsregistar, LSS |
| 1823 | 5977 | 1,46 | Amtsregistar, LSS |
| 1824 | 6116 | 2,27 | Amtsregistar, LSS |
| 1825 | 6163 | 0,76 | Amtsregistar, LSS |
| 1826 | 6283 | 1,91 | Amtsregistar, LSS |
| 1827 | 6336 | 0,84 | Amtsregistar, LSS |
| 1830 | 6539 | 1,03 | Fólkatalslistar, LSS |
| 1834 | 6928 | 1,40 | Fólkateljing |
| 1840 | 7314 | 0,88 | Fólkateljing |

| Listi: styttingar, bygdir, sýslur | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | RG. Nov 2010 |
| **NO** | **Norderøe Syssel** | eid | Eide | **VA** | **Vaagøe Syssel** |
| nør | Nordøre | fgj | Fundingsgjov | sav | Sandevaag |
| gie | Gierdum | fun | Funding | mid | Midvaag |
| ups | Upsalon | eld | Eldeviig | sør | Sørvaag |
| bis | Biskopstø | and | Andefjord | bøe | Bøe |
| wan | Waay, N | fuf | Fuglefjord | gsd | Gaasedahl |
| arn | Arnefjord | ler | Leerviig | myg | Myggenæs |
| str | Straand | ngø | Nordregiøthe | | |
| skt | Skaaletofte | ggj | Giøthegiov | | |
| ska | Skard | sgø | Sydregiøthe | | |
| har | Haraldsund | | | | |
| kun | Kunøe | | | | |
| hsm | Husum | | | | |
| bla | Blankeskaale | **ST** | **Strømøe Syssel** | **SA** | **Sandøe Syssel** |
| mgd | Mygledal | ske | Schielling | san | Sands |
| tro | Trollenæs | lei | Leinum | skv | Schaaleviig |
| við | Viderøe | stu | Solitude | hsv | Huseviig |
| qua | Quannesund | qui | Quivig | dal | Dahl |
| mul | Mule | ves | Vestmandhavn | skn | Skarvenæs |
| nto | Nord-toftum | sax | Saxen | sku | Skuuøe |
| deb | Deble | tjø | Tjørneviig | dim | Dimon |
| svi | Svinøe | hal | Haldersviig | | |
| hat | Hattervig | qst | Qualvig, Str. | | |
| kke | Kirke | tho | Thorsviig | | |
| | | kol | Kollefjord | **SU** | **Suderøe Syssel** |
| **OS** | **Østerøe syssel** | kal | Kaldbak | qlb | Qualbøe |
| sol | Solmunde | sun | Sunds | næq | Næs, Qualbøe |
| lam | Lamhauge | høi | Høiviig | qsu | Qualvig, Suderø |
| gli | Glibre | nol | Nolsøe | fam | Famien |
| tof | Tofte | kbø | Kirkebøe | was | Waay, Suderøe |
| næs | Næs og Høy | vel | Velbestad | sum | Sumbøe |
| str | Strænder | hes | Hestøe | agr | Agre |
| skl | Schaale | klt | Kolterøe | por | Porkere |
| skb | Schaalebund | dln | Dahlerne | næp | Næs, Porkere |
| zel | Zelletrøe | asa | Arge, Sandeg.,Aalekj | hov | Hove |
| øre | Øregaard | tvn | Thorshavn | ørd | Ørdeviig |
| nsk | Nordskaale | | | fro | Frodebøe |
| sva | Svinaaer | | | tro | Trongisvaag |